# Til minnis um góða vinmann mín

## Petur J. Vágsá, vanliga róptur Piddi í Búðunum

**Føddur 11.11.46 - deyður 23.11.08.**



Sunnumorgunin tann 23. november fingu vit tey tungu boðini um, at mín góði vinur Piddi var farin, bert 62 ára gamal. Piddi var sonur Hannu og Esmar Vágsá og var triðelstur av 4 systkjum, tvær systrar og tveir brøður. Hann vaks upp í Búðunum og fór sum flestu dreingir til skips sum 14 ára gamal.

Fyrsti túrur hjá Pidda var við Kvikki í 1962, og sigldi hann í fleiri ár sum dekkari við ymiskum skipum. Hann sigldi eisini við norðmonnum, og har untist mær at vera saman við Pidda og Esmar, pápa hansara, við Tampen, hetta var á sumri í 1971. Hetta var einastu ferð, vit vóru til skips saman. Seinni sama heystið misti hann pápa og pápabeiggja sín Louis, tá teir gingu burtur við maskinbátinum Dortheu ein illveðursdag á Norðhavinum. Vit róðu eisini út saman við Eysturhøvda í eina tíð. Seinni fór Piddi á kokkaskúla og sigldi hann øll síni seinnu ár á sjónum sum kokkur.

Pidda havi eg kent, síðan vit vóru smádreingir, og vóru vit vinmenn alla okkara tíð. Vit hava havt nógvar góðar og stuttligar løtur saman. Hann hevði eitt lætt sinni og var sera skemtingarsamur og spjaddi gleði og látur rundan um seg, har hann kom. Vit vóru mangan biltúrin saman og høvdu nógvar hugnaligar løtur í Búðunum og tosaðu um gamlar dagar yvir einum kaffimunni. Hann var ógvuliga gávumildur og dámdi væl at gleða onnur. Hann hevði hjartað á røttum stað og var góður við sína familju, ikki minst systkini og børnini hjá teimum, og fall prátið hjá honum ofta á tey. Piddi var sera áhugaður í politikki og fylgdi hann væl við hvat ið fyrifórst á politiska vígvøllinum. Hann var javnaðarmaður, tað duldi hann ongantíð fyri.

Hann var ein trúfastur vinur, og hvønn sunnumorgun tíðliga ringdi hann til mín og segði: „Nú rennur kaffi niður, kemur tú ikki heim ein túr?“. Seinastu ferð vit tosaðu saman, var leygarkvøldið fyri at hann andaðist. Eg segði við hann, „í kvøld ert tú trongur“, men Piddi sum altíð, við sínum positiva sinni segði, „nei tað hevur onkuntíð verið verri“. Morgunin eftir var tað ikki Piddi, sum ringdi at bjóða til kaffi, hesaferð var tað Simona at siga mær, at nú var Piddi farin.

Góðu tit, sum stóðu honum nær, Harrin styrkið tykkum í sorgini. Góði Piddi, eg sakni teg nógv, vit møtast aftur heima í himli, har verður gott at vera.

Ærað veri minnið og hvíl í friði góði vinmaður.

**Jóannes**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Súsanna Dam, fødd Thomsen**, búsitandi í Havn, andaðist á Ríkissjúkrahúsinum, fríggjadagin, 64 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni mikudagin klokkan 11.30. Tey, ið vilja minnast Súsonnu, kunnu lata eina peningagávu til Føroya Felag móti Krabbameini og arbeiðinum, sum verður gjørt fyri at fáa eina vaccinatiónsskipan mótir lívmóðurhálskrabba, til ungar gentur.

**Ingrid Hansen av Strondum**, andaðist leygardagin á Landssjúkrahúsinum 70 ára gomul.

**Rólant Lenvig**, ættaður úr Hesti, búsitandi í Havn, andaðist á Landssjúkrahúsinum leygarmorgunin 87 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum týsdagin klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni mikudagin kl. 13. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Rólant, kunnu lata Meinigheitshúsinum í Havn eina gávu. Konta í peningastovninum.

Kistan við **Malberg Vang, Froðba**, fer úr kapellinum týskvøldið kl. 18 í Tvøroyrar kirkju. Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar kirkju mikudagin kl. 13. Tey ið vilja minnast Malberg kunnu geva eina gávu til hjartafelagið. Konta í Føroya banka.

**Margretha Jensen, fødd Simonsen**, uttan fyri Garðar í Hoyvík, einkja eftir Herman Jensen, andaðist hósdagin í Holbæk, 95 ára gomul. Jarðarferðin verður hósdagin tann 18. desember kl. 13 frá Tveje Merløse Kirkju, Holbæk.

†

Hervið verður sagt frá, at kæra móðir og systir okkara

**Margretha Jensen**
fødd Simonsen
uttan fyri Garðar í Hoyvík
einkja eftir Herman Jensen

doyði hósdagin tann 11. desember í Holbæk,
95 ára gomul.
Jarðarferðin verður hósdagin tann 18. desember
kl. 13 frá Tveje Merløse kirkju, 4300 Holbæk.

**Sanna Müller og Sigurd Simonsen**

# Onnur stuðulsfløgan hjá Marnar og Árna




Tvíburabrøðurnir Marnar og Árni Andreasen í Havn hava givið út eina fløgu fyri at stuðla arbeiðinum hjá Frelsunarherinum.

Hetta er onnur stuðulsfløgan, teir geva út. Hin fløgan, sum kom út fyri góðum tveimum árum síðan, gav 150.000 krónur til Frelsunarherin.

Yvirskotið av hesi fløguni fer óskert til andaliga og sosiala arbeiðu, ið Frelsunarherurin stendur fyri.

Á nýggju fløguni eru 10 andaligir sangir, sum vanliga verða sungnir í Frelsunarherinum.

Fløgan fæst kring landið og kostar 169 krónur.

†

**Rólant Lenvig**
ættaður úr Hesti
búsitandi í Havn

andaðist á Landssjúkrahúsinum leygarmorgunin,
87 ára gamal.

Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum
týsdagin klokkan 18.
Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni
mikudagin klokkan 13.
Sungið verður úr sálmabókini.

*Vegna tey avvarðandi*
**Malan**

Tey, ið vilja minnast Rólant, kunnu lata Meinigheitshúsinum í Havn eina gávu. Konta í peningastovnunum

Dagurin
16. desember. Lázarus. Vinmaðurin í Betania, sum Jesus vakti upp frá deyðum (Jóhs. kap. 11)..

*(Axel Torgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*